

**Tað er einki galið við motivatiónini hjá fólki í almennum arbeiði, heldur ovastin fyri Maskinmiðstøðina, Niels Juul Kristiansen. Hann roknar við, at tænastustigið hevði lækkað, skuldu privat umvælt landsins maskinur**

# Lívæðrin í ve

*Dánjal Højgaard*
*Myndir:Jens Kr. Vang*

ALMENT STARV. Á Maskinmiðstøðini norðanfyri Kollafjørð arbeiða einir 20 mans við at umvæla og viðlíkahalda maskinparkina hjá Landsverkfrøðinginum.



**Eyðbjørn Johansen umvælir eina asfaltmaskinu, sum skal vera við til at tryggja føroyska ve**

VRUMM! VRUMM! VRUMM!

Á landsvegnum strúka bilarnir aftur og fram. Persónbilar, bussar og lastbilar drøna framvið, so at skervur og asfalt fúka frá dekkunum.

Hvønn einasta minutt koyra næstan tveir bilar eftir landsvegnum millum Kollafjørð og Hósvík. Í ferðini eru tað helst tey fægstu sum geva sær stórvegis far um tann appelsingula bygningin, omanfyri landsvegin, skamt norðanfyri Kjalnestanga.

**Eita ikki Landsfjós!**

Hetta er Maskinmiðstøðin hjá Landsverksfrøðinginum. Millum manna betri kend sum Landsfjósið. Eitt navn, sum starvsfólkini kortini ikki vilja kennast við.Tá ið Sosialurin ringdi og spurdi um tað var Landsfjósið var svarið stutt og greitt »nei!«, og so varð hornið lagt á.

Aðru ferð – tá ið vit spurdu eftir Maskinmiðstøðini – riggaði betri.

– Her á staðnum er tað at bannast, um tú kallar okkum fyri Landsfjós. Ið hvussu so er millum teir eldru mennirnar, smílist leiðarin á Maskinmiðstøðini, Niels Juul Kristiansen, tá ið hann tekur ímóti okkum á skrivstovu síni.

**Minni virksemi**

Flestøll akfør og flestar maskinur hjá Landsverkfrøðinginum koma á Maskinmiðstøðina. Eisini persónbilar og vøruvognar eins og aldu- og streymmátarar hjá stovninum.

Men kreppan hevur sett síni spor. Tá vega- og tunnilsgerðin steðgaði fyrst í 90-unum rakti tað eisini Maskinmiðstøðina.

– Tá ið eg byrjaði her fyri átta árum síðani vóru vit 32 mans. Nú eru vit bert stívliga 20, sigur Niels Juul Kristiansen.

**Einki stress**

Hendan dagin var ið hvussu so er ógvuliga friðaligt á verkstaðnum. Menn tóku sær góðar stundir at práta. Aðrir støðgaðu á og balladu sær eina sigarett meðan teir lýddu á samrøðuna. Einki stress.

Friðsælan kann tó eisini hava eina nattúrligu forkláring, tí virksemið hjá Landsfjósinum liggur lutvíst uttanfyri sjálvan verkstaðin. Brotnar ein asfalttrumla í Funningi ella ein kavaplógv í Skopun, verða smiðirnir nevniliga boðsendir beinanvegin. Landsfjósið ambætar øllum maskinum í Norðaru helvt av Eysturoynni, í Streymoynni, Vágum og Sandoynni. Hini økini í landinum hava sínar egnu økisverkstaðir.

**Fløktar umvælingar**

Í teirri stóru verkstaðarhøllini – hjartanum í Landsfjósinum – standa einar 10 maskinur. Her stendur ein nýmálað og nýsandblást gravkúgv. Ein gamal og slitin lastbilur treingir til eina bøtandi hond. Og í hinum endanum á høllinum verður arbeitt uppá eitt ljósaggregat, sum stendur inni í eini stórari bingju.

Við ein hvørvistein stendur ungi Gunnfríður Dahl-Olsen og brýnir ein meitil.

– Hugurin hevur altíð verið til at skrúva, sigur Gunnfríður, sum er í ferð við at skifta turbinuna á eini gravkúgv. Hann er lærlingur og honum dámar væl hjá tí almenna.

– Tað góða við hesum arbeiðinum er, at tú sleppur at gera nógvar fløktar reparatiónir. Á einum bilverkstaði snýr tað seg bara um útstoyt, oljuskift og stoytdoyvarar.

Lærlingalønin hjá Gunnfríði er 1.400 krónur um vikuna. Ei dáni í, at hann kundi hugsa sær tað vælløntu yvirtíðina, sum møguleikar eru fyri hjá tí privata.

– Her liggur arbeiðstíðin millum klokkan 8 og 5, slær tann ungi lærlingurin fast, meðan neistarnir fúka um oyrini á honum.

**Drama á hávetri**

Tað er ikki minst á hávetri, at boð eru eftir teimum á Maskinmiðstøðini.

Tá ið kavastormarnir herja er umráðandi, at maskinurnar fáa grivið millum bygda. Brotnar ein maskina ella skal slitstálið skiftast á eini kavaskuffu, eru snarboð eftir smiðunum.

– Hetta er tann mest dramatiska tíðin í okkara arbeiði, sigur leiðarin á Maskinmiðstøðini.

Niels Juul Kristiansen ivast stórliga í, um tænastan hevði verið eins góð um verkstaðurin var á privatum hondum. Ein privat fyritøka noyðist at hugsa um pengaliga vinningin, og tí hevði vandi verið fyri, at almennar uppgávur – so sum kavarudding – máttu víkt fyri øðrum meira lønandi uppgávum.

– Mann kann spyrja seg sjálvan, hvat ið hevði hent um t.d. tvær ella tríggjar maskinur brotnaðu. Hevði ein privatur verkstaður so vilja átikið sær ta almennu uppgávuna fram um t.d. eitt trolspæl. Uppiløgudagar eru sum kunnugt dýrir, sigur Niels Juul, og rør harvið fram undir, at eitt privat Landsfjós hevði umhugsa støðuna væl og virðiliga áðrenn tað avsegði ein privata kunda.

**20.000 eykalutir**

Inni á eykalutagoymsluni situr Hergi Hádal.

Einaferð var Hergi pensioneraður. Men bara í eina viku. So vóru boð eftir honum um at koma aftur í Landsfjósið at røkja starvið sum leiðari á eykalutagoymsluni eina tíð afturat. Hann er 69 ára gamal.

Á eykalutagoymsluni liggja okkurt um 20.000 eykalutir, sum Hergi og teir skjótt finna fram til við at trýsta á nakrar knøttar á telduni. Men tá ið maskinurnar brotna á landvegnum er mangan neyðugt at ringja uttanlands eftir serligum eykalutum.

Høvuðsleverandørur er Caterpillar, sum hevur høvuðsstøð í Belgia. Vanliga ganga 14 dagar til eykalutirnir eru frammi í Føroyum. Hevur tað bráskund kunnu eykalutirnir vera frammi eftir einum samdøgri.

– Eg eri eitt sovorið A-menniskja, so eg møti tíðliga. Í morgun kom eg klokkan 6. Tú fært nógv av skafti, tá ið tú ikki alla tíðina verður órógvaður av telefon og telefaxi, sigur Hergi, sum longu hevði fingið fleiri bíleggingarnar frá hondini, tá ið hini komu til arbeiðis hendan morgunin.

Hergi heldur skil á, hvat ið eykalutirnir verða brúktir til. Hetta so, at høvuðsbókhaldið kann staðfesta, hvat ið landsins pengar verða brúktir til.

**Løn til tíðina**

Mitt í maskinhøllini stendur Eyðbjørn Johansen og umvælir eina stóra hvíta Wirtgen-asfaltmaskinu. Á gólvinum liggur sjálvur motorblokkurin, sum teir hava skift út. Motorurin var í skeljasori.

Hjá Eyðbirni stóð valið millum Tórshavnar Skipasmiðju og Landsverksfrøðingin, tá ið hann skuldi velja sær lærupláss. Hann angrar ikki, at hann valdi landið fram um Poul Mohr.

– Hetta er eitt gott arbeiðspláss. Fyrimunurin er, at arbeiðið er so fjølbroytt. Vit gera allar umvælingar, líka frá hjólbørum til stórar gravkýr, dumparar og lastbilar, sigur maskinsmiðurin, sum heldur vil hava trygd fyri inntøkuni enn høga løn.

– Eg havi arbeitt hjá tí privata. Tað er ein stórur fyrimunur, at tú veist, at tú fært tína løn. Um hon er eitt sindur minni enn á privata

---

# K@T@-hornið

Nr. 7 · hósdagur 4. mai 2000 · 74. árgangur

**Tíðindablaðið Sosialurin,** Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
**Blaðstjórn:** Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

**Bla›stjórn**



*Steinbjørn í Dali*



*Finn Jensen*

# N‡ggj tøkni: 400 Gigabyte á einum $cm^2$




Eitt n‡tt slag av magnetflís (chip) ver›ur royndarkoyrt í USA, har ein flokkur av granskarum vi› Naval Research Laboratory hava ment eina goymsluchip, sum skal kunna goyma upp til 400 Gigabyte á einum kvadratsentimetri. Eftir ætlan ver›ur flísin framleidd seinni í ár, og ey›nast verkætlanin fer vanligi har›diskurin í søguna.

Granskarnir siga, at tørvurin á eini skjótari goymsluskipan fer at økjast í framtí›ini, har mobilar loysnir, sum hond-teldur og fartelefonir vi› atongd til Alneti› og kalendara- og teldupostskipanir, fara at hava ein stóran leiklut í tøkniliga samskiftinum.

Stór telduvirki sum IBM, Motorola og Honeywell arbei›a vi› eini líknandi verkætlan, men Naval granskarnir eru komnir longri enn kappingarneytarnir. Um ta› ver›uliga letur seg gera, at goyma 20 fer›ir so nógv, sum dagsins 60 Gigabyte har›diskur, er talan um kollveltandi frambrot á økinum.

Goymsla av stórum datamongdum í smáum tólum, eitt nú talgildismyndatólum og hondteldum, er ein av størstu avbjó›ingunum hjá KT mennarum. Hetta kemst av at fólk arbei›a alsamt meira vi› margmi›latøkni (multimedia) og myndum.

Fyrimunurin vi› goymsluflísini, frammum vanligu harddiskarnar og magnetbondini, er at magnetiskir komponentum ikki n‡tist tí› til at starta upp. So skjótt sum streymurin er settur til tóli›, eru uppl‡singarnir atkomiligir.

Uppl‡sningar um granskingarstovnin, Naval Research Laboratory, kunnu fáast vi› at fara inn á teirra heimasí›u: http://www.nrl.navy.mil/

# Gera skei› eftir ynski

**Formula.fo ger skei›, sum brúkarin ynskir at fáa tey. Tí›in vi› standard telduskei›um har í húsinum er farin, sigur útbúgvingarlei›arin**

**Edvard Joensen**

Formula.fo hevur slept standard skei›unum og er fari› undir at halda skræddaraseyma› skei›, gjørd solei›is sum kundin ynskir tey.

Jens Godik Højen, útbúgvingarlei›ari, sigur, at eitt ta› fyrsta hann gjørdi, tá hann kom á Formula.fo í vár, var at kollvelta allan skei›-politikkin.

Sjálvandi eru ta› kundar, sum ynskja vanligu skei›ini, sum allir kappingarneytarnir eisini hava, men sjálvur hevur hann tann málsetning, at tú skalt fáa eitt upplivilsi gjøgnum tína útbúgving. So hví ikki gera útbúgvingina solei›is, sum kundin vil hava hana, og so fáa nøgdar kundar?

Jens Godik Højen sigur, at ta› hevur veri› ein stuttlig uppliving at gera skei›ini til tørvin hjá kundanum. Tá ber til at fáa nógv størri úrtøku úr einum skei›i, sigur hann. Og ta› grundar hann á, at tá kundin bara kemur at læra ta›, hann veit, at hann hevur brúk fyri, ver›ur áhugin eisini størri av tí sama. Ta› er hóast alt munur á at hava kundar, sum fara avsta› vi› 100% úrtøku í mun til ta› vanliga, tá tey kanska dugdu tey 50%, á›renn tey komu.

Sum skei›lærari í edv gjøgnum fleiri ár hevur Jens Højen lært, at fólk ofta vita, hvat tey vilja hava, á›renn tey koma á skei›. Ásannandi hetta hevur n‡ggi útbúgvingarlei›arin valt bara at hava skei›, sum eru umbi›in eftir ynski.

Skei›ini ver›a skipa› eftir ynski. Ein dag, fleiri dagar, hálvan dag, um ta› ber til, og so framvegis. Tó sigur Jens Højen, at hann plagar at rá›geva fólki, um hann heldur, at ynski teirra eru órealistisk.

Ta› ber tó framvegis til at fáa teldukoyrikortini frá Formula.fo, sigur hann. Eisini ta› stóra koyrikorti›. Fólk vilja nevniliga hava eitthvørt skriftligt prógv upp á sína vitan, sigur hann. Og tá tú skal byggja eitthvørt, eisini eitt telduskei›, er ta› skilagott at hava grundina í lagi fyrst.

Í heyst ver›ur fari› undir Mous skei›ini. Ta› vil siga at geva certificat í Office pakkanum. Hesi skei›ini er hann sera spentur uppá, sigur Jens Godik Højen, útbúgvingarlei›ari hjá Formula.fo.

Hesi skei›ini byggja nógv upp á egin avrik og ikki bara »tangapassarapedagogikkin, sum hann nevnir ta›, har veitarin bara fyllir á, og kundin tekur ímóti.

Ta› gongur meira út uppá, at tann, sum undirvístur ver›ur, sjálvur undirvísir. Ta› skuldi helst enda› vi›, at fyritøkurnar ikki skulu hava fyri ney›ini at fara út a›rasta›ni eftir serkunnleikanum, men hava superbrúkaran heima hjá sær sjálvum, sigur Jens Højen.



**Jens Godik Højen, útbúgvingarlei›ari**

Í heyst ver›ur eisini fari› undir sonevnd »ole« skei›, sum Jens Højen er sera spentur uppá.

Ta› eru skei›, har undirvíst ver›ur upp á tvørs av súlunum, sum skei›ini vanliga byggja á. Skei› har tú rætt og slætt lærir at brúka tær skipanir, sum maskinan goymir, í sambandi hvør vi› a›ra. Til dømis Word, Exel og Acces.

Undirvísingin hjá Formula.fo fer fram í fleiri stø›um. Bæ›i úti vi› Velbasta›vegin í Havn, har Formula.fo hevur høvu›sstø›, og vi› Tinghúsvegin, har telducaféein er. Og júst í hesum døgum ver›ur gjørd n‡ggj skúlastova í kjallaranum vi› Tinghúsvegin. Í Rokkjallaranum, sigur Jens Godik Højen. Eisini hevur Formula.fo eina skúlastovu á Sjómansheiminum í Runavík, har vanliga fólk ha›ani av lei›ini koma.

Uttan at nevna naka› tal, letur útbúgvingarlei›arin væl at undirtøkuni. Og kundagrundarlagi› er breitt, sigur hann.

Jens Godik Højen sigur, at hann veit ikki um nakran av kappingarneytunum, sum rekur skei›virksemi á hendan hátt vi› individuellum skei›um. Um kapping sigur hann annars, at hana dámar honum væl. Hon gevur íblástur til at fara undir okkurt n‡tt, sum eingin annar enn hevur funni› uppá.

Ta› ver›ur nógv vanligari vi› eftirútbúgvingum í Føroyum í framtí›ini, enn ta› er í dag, er Jens Højen ivaleysur í. Edv broytist dagliga, so ta› er rætt og slætt ney›ugt vi› endurútbúgving, sigur hann. Og hann metir eisini, at føroyingar eru vi› at broyta hugbur› tann vegin, at teir síggja, at ta› er ney›ugt. Fyrr hevur ta› veri› solei›is, at tá tú ert li›ugur vi› eina útbúgving, so er bara li›ugt. Men solei›is er ta› ikki meira. Tey ungu í dag hava a›ra uppfatan. Menningin gongur eisini alt meira burtur frá standardisering til individualismu, sigur Jens Godik Højen, útbúgvingarlei›ari hjá Formula.fo.

# Lítil filmstól avloysa svarta kassan

N‡ggj tøkni hevur vi› sær, at ta› nú ber til at filma alt, sum hendir í førarahúsinum í einum flogfari. Sjálvt myndatóli› er til støddar sum viskile›ri› á einum bl‡anti, og rokna› ver›ur vi›, at hesin háttur kann loysa trygdartrupulleikarnar umbor› á ein betri hátt, og neyvari vísa orsøkir til at flogfør detta ni›ur.

*Smátí›indi:*

# Damgaard letur upp e-handil

KT-risin Damgaard, i› millum anna› ger fíggjarskipanina Concorde, fer nú í gongd vi› e-handil, og hevur í hesum sambandi keypt 10 % av partabrøvunum í e-handilsfyritøkuni proAcitv.

Partabrøvini eru mett til 100 milliónir krónur, har Damgaard sostætt eigur fyri 10 milliónir í partabrøvum. Ætlanin vi› partabrævakeypinum er at fáa atgongd til n‡ggjastu tøknina innan e-handil, ver›ur sagt í almennum tí›indaskrivi frá fyritøkuni.

Vit hava ongar ætlanir um at reka nethandil, men vi› hesi íløgu ver›a vit medeigarar í fyritøku, sum hevur sett e-handil ovast á breddan. Hetta fer at geva okkum vitan, i› vit kunnu n‡ta í menningini av n‡ggjum handilsskipanum, sigur Preben Damgaard.

Sí›an stovnanina í 1997 er ProActive vaksi› munandi. Felagi› hevur ment tøkniliga infrastrukturin hjá millum ø›rum IBM, Lego, Vubi.com, HABURI.com og fløguhandlinum Boxman. Máli› er at fáa ein umsetning uppá 100 milliónir í ár.

Vit eru í stórari menning, og ynskja at vinna størri førleika vi› alheims menningarskipanum. Vi› n‡ggjum kapitali og førleikanum hjá Damgaard, eru vit rusta›ir til n‡ggjar útfordringar, sigur stjórin hjá ProActive, Max Swejbæk.

*Á heimasí›uni hjá Damgaard ver›ur l‡st vi› integrera›um virkisloysnum*

